tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 28.12.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard og Arnfinn Bech

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 90/24 | 24/00330-2 | Skipan av Tvøroyrar býráð valskeiði (2025-2028) -skipan av valbólkum samsv. §3 í kommunustýrislógini |
| 91/24 | 24/00334-1 | Skipan av Tvøroyrar býráð valskeiði (2025-2028) -val av limum í fíggjarnevndina |
| 92/24 | 24/00335-1 | Skipan av Tvøroyrar býráð valskeiði (2025-2028) -val av nevndarlimum í §29 "Føstu nevndirnar" |
| 93/24 | 24/00336-1 | Skipan av Tvøroyrar Býráð (2025-2028) -val av umboðum til §39 "Aðrar nevndir og umboðan" |
| 94/24 | 24/00372-1 | Býráðsfundir -fundardagar í 2025 |
| 95/24 | 24/00373-1 | Fíggjarnevndin -fundardagar í 2025 |
| 96/24 | 24/00374-2 | Fundarskipan fyri Tvøroyrar býráð |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – Ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 90/24
## 24/00330-2 Skipan av Tvøroyrar býráð valskeiði (2025-2028) -skipan av valbólkum samsv. §3 í kommunustýrislógini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 90/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18. nov. 2024**
Sambært Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023 er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

Stk. 3. Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.

Stk. 4. Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

§ 29. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Stk. 3. Nærri reglur um nevndararbeiðið kunnu verða ásettar í eina fundarskipan.

Sambært fráboðan í valbrævi frá form. í valnevndini, Jean Dimon dagf. 13. november er vinnarin av kommunustýrisvalinum 12. november 2024, Listi T, “Felagslistin”, og fyrst valdi kommunustýrislimur á Lista T “Felagslistanum” er Kristin Michelsenvið 265 atkvøðum.

**Valúrslit:**

| Listi | Flokkur | Atkvøður | % | Vald |
|---|---|---|---|---|
| C. | Javnarflokkurin | 384 | 32,6 | 2 |
| T. | Felagslistin | 586 | 49,8 | 4 |
| F. | Listi F | 207 | 17,6 | 1 |
| Atkvøður í alt | | 1177 | | Blankar/ógild. |
| Valrætt/vallutøka | | 1326 | 89,4 | 7/2 |

Kommunustýrislimir valskeiði 2025-2028: (Raðfylgja samb. valbrøvum dagf. 13. nov. 24):

| Nr. | Navn | Atkvøður | Listi | Flokkur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kristin Michelsen | 265 | T | Felagslistin |
| 2 | Bjarni Hammer | 203 | C | Javnarflokkurin |
| 3 | Eyð Eidesgaard | 95 | C | Javnarflokkurin |
| 4 | Anita Vibergsdóttir | 89 | T | Felagslistin |
| 5 | Barbara Micalina Tausen | 59 | T | Felagslistin |
| 6 | Alvi Mortensen | 59 | T | Felagslistin |
| 7 | Anfinn Bech | 47 | F | Listi F |

**Tvøroyrar býráð 16. November 2024:**
Samtykt við 4/0/3 atkvøðum at velja Kristin Michelsen til borgarstjóra valskeiði 2025-2028.

**Skipan av valbólkum**
**§ 3** í Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023 er ásett:

Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

Stk. 2. Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.

Stk. 3. Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.

Stk. 4. Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.

Stk. 5. Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðslimum til at boða frá valbólkum.

**Býráðið 28. december 2024:**
Kristin Michelsenboðar frá, at «listi T, Felagslistin» og List C, Javnarflokkurin eru farin saman í valbólk, og eri umboða av 6 býráðslimum. Listi T, Felagslistin er umboðaður av Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Anita Vibergsdóttir, Barbara Michalina Tausen. Listi C, Javnarflokkurin er umboðaður av Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer

Arnfinn Bech á Lista F kunnar um, at hann ikki er í nøkrum valbólkið

**91/24**
**24/00334-1 Skipan av Tvøroyrar býráð valskeiði (2025-2028) -val av limum í fíggjarnevndina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 91/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Sambært § 28 og § 38 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28 Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. Pkt

§ 28 stk 2 ásetir:

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 38 Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

Stk. 2. Fíggjarnevndin samskipar og fylgir við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja eftir lutfalsvalháttinum 2. limir til fíggjarnevndina, *(borgarstjórin er føddur formaður í nevndini)*, umframt at býráðið velur 3 tiltakslimir.

**Býráðið 28. december 2024:**
**Fíggjarnevndin:** Val av 2 limum og 3 tiltakslimur til fíggjarnevndina. - *(borgarstjórin er føddur formaður í fíggjarnevndini);* **Kristin Michelsen**skjýtur upp, at fíggjarnevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Anita Vibergsdóttir |
| Alvi Mortensen | Barbara M. Tausen |
| Bjarni Hammer | Eyð Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**92/24**
**24/00335-1 Skipan av Tvøroyrar býráð valskeiði (2025-2028) -val av nevndarlimum í §29 "Føstu nevndirnar"**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 92/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Sambært §28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28. Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 29. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin fyri Tvøroyrar kommunu skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu skulu veljast limir til niðanfyri føstu nevndir:

1. Sosiala nevnd
2. Tekniska nevnd
3. Mentanarnevndin
4. Vinnu- og havnanevndin
5. Trivnaðar- og umhvørvisnevndin

**Tilmælið:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 3 limir í nevndirnar, umframt 3 tiltakslimir eftir lutfalsvalháttinum.

**Býráðið 28. december 2024:**

**Sosiala nevnd:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; Kristin Michelsen skjýtur upp, at sosiala nevnd verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Anita Vibergsdóttir | Arnfinn Bech |
| Alvi Mortensen | Barbara M. Tausen |
| Eyð Eidesgaard | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**Teknisku nevnd:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; Kristin Michelsen skjýtur upp, at tekniska nevnd verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Alvi Mortensen | Barbara M. Tausen |
| Anita Vibergsdóttir | Arnfinn Bech |
| Eyð Eidesgaard | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**Mentanarnevndina:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; Kristin Michelsen skjýtur upp, at mentanarnevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Barbara M. Tausen | Alvi Mortensen |
| Anita Vibergsdóttir | Arnfinn Bech |
| Bjarni Hammer | Eyð Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**Vinnu og havnanevndina:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; Kristin Michelsen skjýtur upp, at vinnu- & havnanevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Anita Vibergsdóttir | Eyð Eidesgaard |
| Barbara M. Tausen | Alvi Mortensen |
| Bjarni Hammer | Arnfinn Bech |

**Einmælt samtykt**

**Trivnaðar og umhvørvisnevndina:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; Kristin Michelsen skjýtur upp, at vinnu- & havnanevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Barbara M. Tausen | Anita Vibergsdóttir |
| Alvi Mortensen | Bjarni hammer |
| Eyð Eidesgaard | Arnfinn Bech |

**Einmælt samtykt**

**93/24**
**24/00336-1 Skipan av Tvøroyrar Býráð (2025-2028) -val av umboðum til §39 "Aðrar nevndir og umboðan"**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 93/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Sambært §35, 36 og 37 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 35.** Har kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum skal vera umboðað í øðrum nevndum ella tílíkum, og kommunustýrið bert skal velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

Stk. 2. Skal ein nevnd ella tílíkt verða mannað við øðrum enn bara kommunustýrislimum, fer valið av teimum, ið kommunustýrið skal velja, fram undir einum.

Stk. 3. Í teirri raðfylgju, sessirnir verða lutaðir einum bólki, kann bólkurin tilnevna limir ella onnur, til annað slag av sessum er sett.

**§36.** Kommunustýrið kann seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd.

Stk. 2. Kommunustýrið ásetir nærri reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.

****

**§ 30** í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu er ásett at veljast skulu limir og varalimir til niðanfyri aðrar nevndir: *Valið verður at fara fram eftir luftfalsháttinum.*

**§31,** Barnaverndarnevndina
Veljast skulu 1. fastur limur og 1. varalimur

**§32,** Tilbúgvingarnevndin, *borgarstjórin er føddur form.*
Veljast skulu 2. fastir limir og 3. varalimir.

**§33,** Ferðslunevndin, *somu limir sum í teknisku nevnd.*
Veljast skulu 1. umboð fyri løgregluna og 1. varaumboð fyri løgregluna. 1. umboð fyri koyrilærarar og 1. varaumboð fyri koyrilærarar.

**§34**
*Stk.1.* Skúlastýrið
Veljast skulu 2. fastur limir og 2. varalimir

*Stk.2.* Kommunufelagið
Borgarstjórin er føddur limur

*Stk.3.* Valnevndin
Veljast skulu 5. Fastir limir og 5. varalimir

*Stk.4.* Tvøroyrar Bygda- og sjóvinnusavn
Veljast skal 1. fastur limur og 1. varalimur

*Stk.5.* Umboð í IRF
Veljast skal 1. fastur limur og 1. varalimur

*Stk.6.* Umboð í SEV
Veljast skal 1. fastur limur og 1. varalimur

*Stk.7.* Suðuroyar Ellis- og Røktarheim
Veljast skal 1. fastur limur og 1. varalimur

*Stk.8.* Suðuroyar Bú- og Heimatænastu, b*orgarstjórin er føddur limur*
Veljast skala 1. fastur limur og 2 varalimir

*Stk.9.* Barnaverndartænastan (stýrislimur í samstarvsnevndina)
Veljast skala 1. fastur limur og 1 varalimur

*Stk.10.* Umboð í bygginevndina fyri nýggja kappróðrarneystið á Hvítanesi
Veljast skulu 4 limur, 1 tiltakslimur og ein ráðgevi *(Form. í FSR er form í bygginevndini)*

*Stk.11.* Umboð í nevnd at fyrireika Suðuroyartunnilin.
Veljast skulu 2 limur, 2 tiltakslimur.

**Tilmælið:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja fastar limir og tiltaks limir í aðrar nevndir eftir lutfalsvalháttinum samsvarandi valbólkabýtið.

**Býráðið 28. december 2024:**

**AÐRAR NEVNDIR OG UMBOÐAN, SAMB. KAP.7, Í KOMMUNUSTÝRISLÓGINI**

**§ 35.** Har kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum skal vera umboðað í øðrum nevndum ella tílíkum, og kommunustýrið bert skal velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

Kristin Michelsen mælir til, at velja umboð í aðrar nevndir samb. Kap.7, §35 í kommunustýrislógini og skjýtir upp:

**Barnaverndarnevndina:** Val av 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at barnaverndarnevndin verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Steingrím Niclasen | Daniella Hovsgarð |

**Einmælt samtykt**

**Tilbúgvingarnevndin:** Borgarstjórin er føddur form. og vera fyri uttan borgarstjóran 2 limir og 3 tiltakslimur uppskot til tilbúgvingarnevndin er:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Anita Vibergsdóttir |
| Alvi Mortensen | Barbara M. Tausen |
| Eyð Eidesgaard | Arnfinn Bech |

**Einmælt samtykt**

**Ferðslunevndin:** Somu limir sum í teknisku nevnd, umframt 1 umboð fyri løgregluna og 1 varaumboð fyri løgregluna, 1 umboð fyri koyrilærarnar og 1 vara-umboð fyri koyrilærarnar; Kristin Michelsen skjýtur upp, at barnaverndarnevndin verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Alvi Mortensen | Barbara M. Tausen |
| Anita Vibergsdóttir | Arnfinn Bech |
| Eyð Eidesgaard | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**Skúlastýrið:** 2 limir og 2 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at skúlastýrið verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Barbara M. Tausen | Anita Vibergsdóttir |
| Eyð Eidesgaard | Arnfinn Bech |

**Einmælt samtykt**

**Valnevndin:** 5 limir og 5 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at valnevndin verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Mariann Mikkjalsdóttir | Ronald Robertson |
| Armgarð Sørensen | Elinborg Mortensen |
| Mina Joensen | Jónleyg J. Bech |
| Jónhild Andreasen | Annika Eidesgaard |
| Diana Heinesen | Malla Dam |

**Einmælt samtykt**

**Tvøroyrar Bygda- og sjóvinnusavn:** 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði fyri Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn verður:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Anita Vibergsdóttir | Kristin Michelsen |

**Einmælt samtykt**

**Skjalasavnið:** 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði fyri Skjalasavnið verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**Umboð í IRF:** 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði fyri IRF verður:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Anita Vibergsdóttir | Eyð Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**Umboð í SEV:** 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði fyri SEV:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Barbara M. Tausen | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim:** 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði fyri Suðuroyar Ellis- og Røktarheim verður:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**BHS, Suðuroyar Bú- og Heimatænastu:** 1 limur og 2 tiltakslimur *(borgarstjórin føddur limur)*; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði fyri BHS, Suðuroyar Bú- og Heimatænastu verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Anita Vibergsdóttir |
| Eyð Eidesgaard | Bjarni Hammer |

**Einmælt samtykt**

**Barnaverndarstýrið:** 1 limur og 1 tiltakslimur; Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboði Barnaverndarstýrið verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Forfólk í sosialunevnd | Barbara M. Tausen |

**Einmælt samtykt**

**FSR** *(Bygginevnd fyri bygging av nýggjum kappróðrarneystið á Hvítanesi)***: 4** limur og 1 tiltakslimur, umframt form. í FSR, og 1 ráðgeva umboði:
Kristin Michelsen skjýtur upp, at umboðini fyri verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | |
| Barbara M. Tausen | |
| Alvi Mortensen | |
| Bjarni Hammer | |
| Eyð Eidesgaard | |
| Rógvi Thorsteinsson | |

**Einmælt samtykt**

**Musikkskúlin** fyri Suðuroy, 1 limur og 1 varalimur

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Pól Arni Holm | Anita Vibergsdóttir |

**Einmælt samtykt**

**Suðuroyartunnilin (fylgi- og fyrireikingarbólkur)**
Kristin Michelsen mælir til, at velja umboð í nevnd at fyrireika kommununa uppá Suðuroyartunnulin, og at valt verða 2 limur og 2 tiltakslimir

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Alvi Mortensen |
| Bjarni Hammer | Eyð Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**94/24**
**24/00372-1 Býráðsfundir -fundardagar í 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 94/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.12.2024**
Mælt verður til at hava býráðsfundir samb. niðanfyri skrá.

| Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Mai | Jun |
|---|---|---|---|---|---|
| Tór. 30 | Tór. 27 | Tór. 27 | Óns. 30 | Óns. 28 | Tór. 26 |

| Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|
| ongin | ongin | Týs. 30 | Tór. 30 | Tór. 27 | Tór. 18 |

**Býráðsfundir**

Býráðsfundir eru vanliga eina ferð um mánaðin, *-vanliga seinasta tórsdag í hvørjum mánaði-.* Býráðsfundir vera vanliga hildnir í býráðssalinum á kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, kl. 17.00 um ikki onnur fráboðan verður kunngjørd.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu býráðsfundirnar kann býráðið halda eykafundir, tá ið støða skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund. Juli og august heldur býráðið vanliga summarfrí.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (Kommunustýrislógin) Kapittul 3, Kommunustýrisfundir

§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir skulu vera ásettar í fundarskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. Stk. 2. Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.

**Tilmæli:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 28. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá umsitingini.

## 95/24
## 24/00373-1 Fíggjarnevndin -fundardagar í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 95/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.12.2024**
Mælt verður til at hava fundir í fíggjarnevndini 2025 samb. niðanfyri skrá.

**Fíggjarnevndin**
Fíggjarnevndin hevur vanliga fund, tórsdag vikuna fyri sum býráðsfundur er. Mál, ið ynskjast viðgjørd í Fíggjarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum fíggjarnevndarfundur er.

| Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Mai | Jun |
|---|---|---|---|---|---|
| Tór. 23 | Tór. 20 | Tór. 20 | Tór. 24 | Tór. 22 | Tór. 19 |

| Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|
| ongin | ongin | Tór. 25 | Tór. 23 | Tór. 20 | Tór. 11 |

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018

**Fíggjarligar avleiðingar: ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan

**Býráðið 28. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá umsitingini.

**96/24**
**24/00374-2 Fundarskipan fyri Tvøroyrar býráð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.12.2024 | 96/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Samb. kommunustýrislógina skal ein fundarskipa samtykkjast fyri kommunustýrið

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, (Kommunustýrislógin).

> ***§ 5.*** *Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.*
>
> *Stk. 3. Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um sína málsmannagongd í eini fundarskipan.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Uppskot til fundarskipan fyri kommunustýrið setuna 2025-2028 verður við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 28. december 2024:**
Málið verður útsett til næsta fund.

Fundurin lokin kl. 18:15

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Eyð Jóna Eidesgaard

Bjarni Hammer

Arnfinn Bech